Vikublaðið Sosialurin



# Hvørjar møguleikar hava vit í

**Seinastu dagarnar hevur verið sett rættuligt focus á støðu Føroya sum partur av Europa. Danski uttanríkisráðharrin vitjaði og umrøddi eisini hesar spurningar. Og um sama mundið skipaði Norðuratlantsbólkurin fyri almennum fundi í Miðlahúsinum, sum eisini varð varpaður í Rás2 til allar Føroyar. Evnið á fundinum var m.a. hvørjar møguleikar Føroyar hava í ES/EFTA/EBS.**

FØROYAR OG EUROPA

*Jan Müller*
*Jan@sosialurin.fo*

Í hesum sambandi helt danski løgfrøðisprofessarin Ole Spiemann fyrilestur. Hann hevði so eisini skrivað eitt upprit til fundin. Vit fara her at prenta niðurstøður og samandrátt av umrødda uppriti.

## Niðurstøðurnar í stuttum:

Tað er útilokað, at Føroyar kunnu fáa limaskap í EFTA ella ES undir egnum navni.

Hesir felagsskapir eru, sambært sjálvum sáttmálagrundarlagnum, bert fyri statir.

Føroyskur limaskapur í egnum navni krevur loysing.

Føroyar kunnu heldur ikki gerast partur í EBS-avtaluni undir egnum navni.

Henda avtala er bert fyri limirnar í EFTA ella ES.

Føroyskur limaskapur í egnum navni krevur loysing.

Føroyar kunnu fáa limaskap í EFTA vegna Danmark.

Hetta hevði kravt, at Danmark, sum fór úr EFTA í 1973, meldaði seg inn av nýggjum, men hesaferð bert vegna ein ávísan landafrøðiligan part av Danmark: Føroyar.

Henda loysnin hevði í fyrsta lagi kravt, at EFTA limirnir góðtaka eina skipan, har Danmark, landafrøðiliga avmarkað til Føroyar, verður nýggjur limur. Í øðrum lagi hevði tað kravt at eitt ískoyti varð gjørt til EFTA-sáttmálan sum segði, at danski limaskapurin bert fevnir um Føroyar.

Fólkarættarliga er eingin forðing fyri hesum, og statsrættarliga kann tað fremjast sambært uttanríkispolitisku heimildarlógini.

Hetta er treytað av, at øll viðkomandi málsøki eru yvirtikin.

Eru øll viðkomandi málsøki ikki yvirtikin, kann stjórnin kortini í hesum máli geva Føroyum eina ítøkiliga heimild, sum fer út um heimildarlógina.

Føroyar kunnu gerast partur av EBS-avtaluni vegna Danmark.

Sambært donsku stjórnini og sambært forarbeiðinum til heimildarlógina er tað útilokað at Føroyar gerast partur av EBS-avtaluni, hóast Føroyar gerast EFTA limur vegna Danmark. Hetta kemst av, at Danmark longu er partur av hesi avtalu. Danmark er bert eittans fólkarættarligt subjekt, og kann tí ikki gera eina fólkarættarliga avtalu við seg sjálvt.

Men hetta er sambært Spiermann ikki røtt tulking. Tað er rætt, at Danmark ikki kann virka sum um talan var um tveir (ella tríggjar) statir í senn. Men tað kann fólkarættarliga ikki útihýsast, at limaskapur Danmarkar í EBS-avtaluni verður býtur sundur í tveir (ella tríggjar) partar. Ein part, sum er er galdandi fyri Danmark, landafrøðiliga avmarkað til "suður-Danmark" og ein annan, sum er galdandi fyri Føroyar. (Og evnt. ein triðja, sum er galdandi fyri Grønland).

At framt hetta hevði í fyrsta lagi kravt, at danska stjórnin verður sannførd um, at hennara fatan er skeiv, og er sinnað at broyta hana.

Avtalan skuldi so verið millum Kongsríki Danmarkar sum ES lim og allar hinar partarnar - uttan ein: Nevniliga Kongsríki Danmarkar sum EFTA lim. Á sama hátt skuldi avtalan verið gjørd fyri Kongsríki Danmarkar sum EFTA lim og hinar partarnar undantikið Kongsríki Danmarkar sum ES lim.

Henda skipan skuldi sjálvsagt verið góðtikin av hinum pørtunum í avtaluni.

Viðurskiftini millum teir báðar donsku partarnar av avtaluni kundu møguliga verið skipað innan karmarnar av ríkisfelagsskapinum.

Statsrættarliga kann heimildarlógin ikki nýtast til hetta, men Danmark kundi hinvegin givið Føroyum eina ítøkiliga heimild til hesa loysnina.

Føroyar kunnu gerast partur av ES vegna Danmark.

Sambært donsku stjórnini og sambært forarbeiðinum til heimildarlógina er tað útilokað, at Føroyar kunnu umboða Danmark í ES. Hetta kemst av, at Danmark longu er limur í ES.

Men hvørki stats- ella fólkarættarliga kann tað útilokast, at limaskapur Danmarkar í ES verður býttur í fleiri partar - ein, sum bert fevnir um Danmark, ein, sum bert fevnir um Føroyar (og evnt. ein, sum bert fevnir um Grønland).

Tað kundi blivið trupult at umsitið ein dupultan (ella trídupultan) danskan limaskap í verki, og tað hevði kravt nógva vælvild frá bæði ES sum felagsskapi, og teimum einstøku ES-londunum.

Men hvørki fólka- ella statsrættarliga eru beinleiðis forðingar fyri tí.

Tað hevði ikki kunna verið gjørt sambært heimildarlógini, men hevði kravt eina ítøkiliga heimild frá Danmark til Føroya um júst hetta.

Umframt nógva vælvild frá ES og ES-limunum krevur hetta, at danska stjórnin broytir sína fatan, og er sinnað at virka fyri hesi loysn.

## Eingin rættur

Danmark hevur einki krav uppá, at ein partur av danska statinum kann gerast EFTA limur av nýggjum

Danmark hevur einki krav uppá at kunna gerast partur av EBS avtaluni tvær (ella tríggjar) ferðir.

Danmark hevur einki krav uppá at fáa ein tví- ella tríbýttan ES-limaskap.

Alt hongur tí á nógvari politiskari vælvild frá bæði Danmark, teimum umrøddu felagsskapunum, og teimum londum, sum mynda hesar felagsskapir.

Men tað eru ongar beinleiðis forðingar í fólka- ella statsrættinum.

## Samanumtøka av uppriti Ole Spiermann:

EFTA EFTA (European Free Trade Association) er eitt fríhandilsøki millum Ísland, Liechtenstein, Noreg og Schweiz. EFTA hevur eina røð av fríhandilsavtalum við triðja lond. Danmark var við til at stovna EFTA í 1960, men fór úr í 1973, tá landið gjørdist EF-limur. Føroyar vóru við í EFTA frá 1968 til 1973.

ES ES (Europeiska samveldið) varð stovna í 1993, sum yvirbygningur omaná EF. ES hevur víðfevnd rættindi, men samstarvið snýr seg fyrst og fremst um "tey fýra frælsini" - t.e. at vørur, persónar, tænastur og kapitalur hava frítt at fara innanfyri ES-mørk. ES og ES-limir hava fríhandilsavtalur við nógv lond. Føroyar hava aldri verið í ES.

EBS EBS-avtalan (Europeiska Búskaparliga Samstarvsøkið) varð sett í gildi í 1994. Partarnir eru øðrumegin teir tríggir EFTA limirnir, Ísland, Liechtenstein, Noreg, og hinumegin ES. Hetta er ein avtala sum ger, at "tey fýra frælsini" eru galdandi millum ES og EFTA, men landbúnaðarvørur og fiskavørur eru kortini lutvíst undantiknar. Danmark er, sum ES-limur, partur av avtaluni, men Føroyar standa uttanfyri.

Limaskapur er bert fyri statir Flestu altjóða felagsskapir eru bert fyri statir, ella aðrar felagsskapir av statum. Sera fáir felagsskapir víkja frá hesi grundreglu, og tá oftast í heilt serligum førum.

Bæði víðvíkandi ES og EFTA er eingin ivi um, at bert statir kunnu gerast limir. Tað verður í sáttmálunum bert tosað um "limastatir" og reglur fyri upptøku av nýggjum statum.

So leingi Føroyar eru partur av ríkisfelagsskapinum kunnu Føroyar ikki gerast partur av ES ella EFTA í egnum navni. Limaskapur er bert fyri Kongsríki Danmarkar.



*Ole Spiermann, løgfrøðisprofessari vitjaði Miðlahúsið*

## Um EFTA

Danmark fór úr EFTA í 1973, tí tað bar ikki til at vera limur í bæði EF og EFTA í senn. EFTA limaskapurin umfataði eisini Føroyar, og tí fóru Føroyar eisini úr.

Um nú Danmark aftur skal gerast limur í EFTA krevur hetta, at danski EFTA-limaskapurin landaføðiliga verður skildur frá danska ES-limaskapinum (sum landafrøðiliga bert fevnir um Danmark).

Men danska stjórnin hevur alment givið til kennar, at hon stuðlar føroyskum EFTA-limaskapi. Tí má hon meta, at Danmark kann verða limur í ES við virknað fyri Danmark, og verða limur í EFTA við virknað fyri Føroyar. Men tað er greitt, at Kongsríki Danmarkar kann koma í eina tvístøðu, tá tað er limur í hesum báðum felagsskapum í senn.

ES og EFTA sáttmálarnir útiloka ikki henda møguleika, men nýggjur danskur EFTA-limaskapur, sum bert fevnir um Føroyar, krevur, at eitt ískoyti verður gjørt til í EFTA-sáttmálan um, at danski limaskapurin bert fevnir um Føroyar.

Harumframt skulu EFTA limirnir góðtaka eina skipan, har Danmark, landafrøðiliga avmarkað til Føroyar, verður limur.

Danmark hevur einki rættarkrav uppá hetta, men tað eru ongar ítøkiligar fólkarættarligar forðingar fyri hesi loysnini.

## Um EBS-avtaluna

EBS-avtalan er ein sonevnd assosieringsavtala millum EFTA og ES (t.e. ein avtala, sum á ávísum økjum gevur tí, sum ger hana, somu rættindi, sum limirnir í felagsskapinum, hon verður gjørd við). Partarnir skulu verða limir í antin ES ella EFTA. Av hesum londum er bert Sveis ikki við.

Danmark er limur í ES og partur av EBS-avtaluni. Um Danmark nú eisini verður limur í EFTA við virknað fyri Føroyar, er tað ein spurningur, um Danmark einaferð afturat kann gerast partur av EBS-avtaluni - men hesaferð bert við virknað fyri Føroyar.

Hetta er støða ikki tikin til í EBS-avtaluni. Men tá lond gerast partur av EBS, verður tað gjørt við serligar avtalu - og í tí sambandi kann hugsast, at Danmark kundi fingið ein EBS-limaskap afturat, sum bert var galdandi fyri Føroyar. Hetta hevði kravt lutfalsliga fáar broytingar av EBS-avtaluni. At hennara landafrøðiliga øki verður víðkað, hendir hvørjaferð eitt nýtt land kemur uppí.

Innan EBS-stovnarnar verða avgerðirnar tiknar í semju millum EFTA øðrumegin og ES hinumegin. Kongsríki Danmarkar virkar ikki sjálvstøðugt í hesum stovnum.

EBS avtalan kundi uttan serligar broytingar havt virknað fyri Kongsríki Danmarkar sum ES lim øðrumegin, og hinar partarnar undantikið Kongsríki Danmarkar sum EFTA lim hinumegin - og á sama hátt fyri Kongsríki Danmarkar sum EFTA lim øðrumegin og hinar partarnar undantikið Kongsríki Danmarkar sum ES lim hinumegin.

Men um EBS-avtalan skal víðkast til at fevna um Danmark avmarkað til Føroyar, so má støða takast til, hvussu avtalan skal nýtast millum Danmark avmarkað til Føroyar og Danmark. Hetta kundi møguliga verið loyst innan karmarnar av ríkisfelagsskapinum.

Samanumtikið er ikki fólkarættarligar forðingar fyri hesi loysnini. Sama ger seg galdandi fyri eina møguliga víðkaða handilsavalu millum Føroyar og ES.

## Um ES

Í ES sáttmálanum stendur greitt, at hann ikki fevnir um Føroyar og Grønland. Tí skal sáttmálin broytast - ella skal víkjast frá honum - um Føroyar skulu gerast limir. Men er tann politiski viljin staðar, ber hetta til. Tað var hann t.d. tá Grønland fór úr EF í 1984.

Truplari er at ímynda sær Danmark sum dupultan (ella trídupultan) ES-lim - hóast ein limaskapur skuldi verið avmarkaður til Danmark, ein annar til Føroya (og møguliga ein triði til Grønlands).

Tað er eisini trupult at ímynda sær ein sundurbýttan limaskap, har umboðan Danmarkar verður býtt millum Danmark og Føroyar (og evnt. Grønland) alt eftir evni og dagsskrá. Ein slík skipan hevði kravt serlig átøk, og sera góðan politiskan vilja frá bæði ES felagsskapinum og teimum einstøku ES-limunum. Hetta er møguligt fólkarættarliga - men sera trupult.

Men tað hevði í hesum føri ikki verið nakað fólkarættarligt krav um, at Før-